Krabbamein:

# 190 tilburðir í fjør

**Hetta er talið av føroyingum, sum í 2002 fingu staðfest krabbamein. Hetta er 29 fleiri enn árið fyri**

ÁRSFRÁGREIÐING
*Stefan í Skorini*

Hetta stendur at lesa í ársfrágreiðingini hjá Føroya Felag móti Krabbameini. Talið av krabbatilburðum í fjør er eisini hægri enn miðaltalið átta tey seinastu árini, sum er 180 tilburðir.

23 tilburðir av bróstkrabba vórðu staðfestir í fjør, og hetta talið er fimm færri enn árið fyri. Í miðal hava eisini 23 fólk fingið staðfest bróstkrabba seinastu átta árini.

18 fólk fingu staðfest lungnakrabba í 2002. Hetta eru tríggir fleiri enn í 2001. Í miðal hava 15 fólk fingið lungnakrabba um árið seinastu átta árini.

### Fleiri kvinnur spyrja

Føroya Felag móti Krabbameini hevur eisini eina ráðgevingarstovu, har fólk kunnu ringja ella koma á gátt at spyrja um ráð. Í 2002 vóru 712 telefonsamrøður og vitjanir á ráðgevingarstovuni. Hetta er størsta talið av fyrispurningum, síðan felagið fór at skráseta sítt virksemi.

Tað vísir seg, at nógv fleiri kvinnur enn menn nýta hesa tænastu. 83,4 prosent av fyrispurningunum komu frá konufólki, meðan 16,6 prosent komu frá mannfólki.

Tølini í 2000 og 2001 vóru ávikavist 595 og 430 samtalur og vitjanir. Umleið 35 sjálvboðin eru knýtt at virkseminum í felagnum.

### Eftirlýsa einum alternativi

Felagið fílist í ársfrágreiðingini á, at einki alternativ er til sjúkrahúsið, so at álvarsliga sjúkir krabbameinssjúklingar kunnu fáa viðgerð heima ella á einum øðrum stað uttanfyri sjúkrahúsið.

Helena Dam á Neystabø setti í síni tíð sum landsstýriskvinna ein arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar fyri hesum, og eftirmaður hennara, Sámal Petur í Grund, fekk álit handað frá bólkinum.

Eftir ætlan skuldi eitt palliativt team setast á stovn á Landssjúkrahúsinum, men vegna vantandi fígging er hetta útsett, sigur Føroya Felag móti Krabbameini í ársfrágreiðing síni.

## HAGTØL:

| Ár | tilsamans | bróstkrabbi | lungnakrabbi |
|---|---|---|---|
| 1995: | 156 | 24 | 9 |
| 1996: | 209 | 28 | 15 |
| 1997: | 197 | 13 | 19 |
| 1998: | 173 | 21 | 17 |
| 1999: | 207 | 18 | 15 |
| 2000: | 168 | 26 | 11 |
| 2001: | 162 | 28 | 15 |
| 2002: | 191 | 23 | 18 |
| Í meðal hesi 8 árini | | | |
| | 180 | 23 | 15 |

Tórsvøllur ov lítil:

# Týskarar setast aftur




*Tórsvøllur rúmar bert umleið 6000 fólkum, og øll atgongumerkini eru nú seld. Fleiri týskarar setast nú aftur at koma til Føroya, tí eingi atgongumerki eru tøk*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fótbóltsglaðir týskarar, sum ætlaðu sær at hyggja eftir landsdystinum millum Føroyar og Týskland á Tórsvølli, setast nú aftur í stórum tali. Orsøkin er, at teir ikki fáa atgongumerki til dystin, hóast teir longu hava bílagt ferðaseðil og kamar. Ein ferðaskrivstova heldur, at FSF skuldi latið týskarum fleiri atgongumerki**

LANDSDYSTUR
*Stefan í Skorini*

Tann stóra bylgjan av týskarum, sum skuldi koma til landið tíðliga í juni mánað, er nú minkandi. Orsøkin er, at teir bert hava fingið umleið 600 atgongumerkir til tann nógv umrødda landsdystin, og hetta er ikki nóg mikið at nøkta tann stóra eftirspurningin. Fótbóltssambandið hevur latið týskarum tey kravdu tíggju prosentini av atgongumerkjunum.

Í vetur var talan um eini 1200 bíleggingar frá týskum umboðsmonnum, men bert helmingurin av hesum hava møguleika at fáa atgongumerkir til dystin, og tí eru fleiri, ið nú setast aftur.

Tvær ferðaskrivstovur, Sosialurin hevur tosað við, hava fingið fleiri avlýsingar frá vónbrotnum týskarum, ið ætlaðu sær hendavegin.

– Ein bólkur uppá 40 fólk hevur júst avlýst ferðina til Føroyar, tí umboðsmaðurin í Týsklandi hevur verið ov seinur at bíleggja atgongumerki til dystin, greiðir Svein í Heiðunum á Flogfelag Føroya frá. Hesin bólkur skuldi búgva á Hotel Vágum, men tað hevur eydnast Flogfelagnum at fylla hotellið uppaftur.

Tey í ferðaskrivstovuni Greengate í Havn uppliva tað sama, at fleiri avlýsa sínar ferðir til Føroyar vegna vantandi atgongumerki.

– Tað var altíð væntandi, at talið av ferðafólki ikki bleiv so stórt, tí so fá atgongumerki eru til taks, sigur Marni Hjallnafoss á Greengate.

Ein trupulleiki er, at eingin samskipan er millum søluna av atgongumerkjum til dystin, ferðaseðlum og hotelkømrum. Tá ein ferðaskrivstova selur týskarum ferð til Føroya, verður ikki fregnast eftir, um teir hava atgongumerki til landsdystin.

### Skuldu fingið fleiri atgongumerkir

Marni Hjallnafoss heldur, at FSF kundi latið týskarum fleiri atgongumerkir fyri at stimbra ferðavinnuna enn meira.

– Tað hevði lættliga borið til at selt týskarum 1000 atgongumerkir, og vit burdu latið teimum fleiri atgongumerkir, sigur Marni Hjallnafoss.

Hansara grundgeving er, at tað er umráðandi at fáa nógv ferðafólk til Føroyar, tí fleiri teirra leggja møguliga leiðina aftur hendavegin eina aðru ferð, tey skulu út at ferðast. Tí skuldi henda støðan verið gagnnýtt betur, nú ein so góður møguleiki býðst.

Hann leggur afturat, at tað ikki hevði verið nakar stórur trupulleiki at hýst so nógvum fólki í senn.

– Vit høvdu kunnað nýtt nøkur bygdarhús sum vallaraheim. Tey flestu, sum koma til fótbóltsdyst, eru ikki serliga erkvisin og leggja vertin á, hvussu tey búgva, sigur Marni Hjallnafoss. Greengate fer at hýsa nøkrum at teirra ferðafólki í bygdarhúsinum við Gjógv.

### Ferðafólk uttan atgongumerki

Bæði hjá Flogfelag Føroya og hjá Greengate eru tey vitandi um ferðafólk, sum koma hendavegin uttan nakað atgongumerki til dystin. Tað er í veruleikanum ikki trupulleikin hjá ferðaskrivstovunum, um teirra viðskiftafólk hava atgongumerki til ein landsdyst ella ikki.

Hesi ferðafólkini koma væl hendavegin í tí vón at kunna útvega sær eitt atgongumerki á ein ella annan hátt.

– Trupulleikin er í veruleikanum, at vit hava ov lítið stadion til ein so stóran dyst, sigur Svein í Heiðunum frá Flogfelag Føroya.

# Nevndin skipað seg

NEVNDARVAL
*Stefan í Skorini*

Tann 29. apríl hevði Føroya Felag móti Krabbameini ársaðalfund, og val av nýggjari nevnd var á skránni.

Í nevndini sita nú Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen, Agnar á Dul, Gisela Djurhuus og Eliesar Olsen. Tiltakslimir eru Jónvør Christiansen og Davina Lamhauge.

Jákup N. Olsen er formaður, Helena Dahl Olesen er næstformaður og Agnar á Dul er kassameistari.

Í nevndini fyri Hjálpargrunnin sita Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen,og Eliesar Olsen.



# Fiskivinnuskúrar í Vestmanna

**Fiskivinnuskúlin i Vestmanna hevur kroniskar hølistrupulleikar. Pínan verður doyvd við fyribilsloysnum soleiðis her og har, og tann seinasta av slagnum tykist fara at vera, at fýra arbeiðsskúrar, sum hava staðið uttan fyri tunnilsmunnan í Leynum, enda í túninum hjá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Grannunum dámar einki hesa ætlanina**

SKÚLABYGGING
*Edvard Joensen*




*Fiskivinnuskúlin hevur frá byrjan verið býtisbarn. Hølistrupulleikarnir eru øgiligir, og nú verður aftur tosað um at pjøssa eina fyribilsloysn saman. Men nú fara grannarnir hjá skúlanum at gera vart við seg*

Nú verður partur av hølistrupulleikunum hjá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna ætlandi fyribils loystur við at flyta fýra arbeiðsskúrar úr Leynum og seta teir í túni hja Fiskivinnuskúlanum. Grannunum hjá skúlanum dámar einki hesa loysnina.

Tá skúlaárið byrjar aftur, fara 17 nýggir næmingar at byrja á Fiskivinnuskúlanum. Samstundis fara eisini einir seks- sjey lærlingar frá flakavirkjum og alivinnuni at byrja skúlagongd í Vestmanna, sigur Jákup Andreasen, stjóri á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

Men har er, sum fyrr hevur verið, ov lítið pláss frammaundan, og tað verður ikki betri við fleiri næmingum. Nógvar royndir hava verið gjørdar at loysa hendan trupulleikan, men einki hevur enn borið til.

Nú hevur Mentamálaráðið fingið loyvi frá Vestmanna Kommunu at byggja tvær skúlastovur í túninum uttan fyri Fiskivinnuskúlan. Talan er um ein leysan bygning, sum gerast skal eftir viðlagdari tekning, sigur Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna.

Men trupulleikin tykist vera, at um ætlanin verður til nakað, verður bygt eitt sindur øðrvísi, tí fýra skúrar skulu flytast úr Leynum til Vestmanna, og tað hevur Vestmanna Kommuna ikki givið loyvi til, sigur borgarstjórin.

Jákup Andreasen, skúlastjóri, sigur, at hann hevur biðið um 70 fermetrar av skúlastovu, og at tað svarar til eina fýra av hesum arbeiðsskúrunum, sum standa í Leynum. Hann er annars einki fyri at siga nakað annað um málið í løtuni, men vísir til Mentamálaráðið og Vestmanna Kommunu.

Á Mentamálaráðnum umsitir Hans Andrias Dam Joensen málið, men hann eydnaðist ikki at fáa orð á, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Grannarnir hjá Fiskivinnuskúlanum eru einki fegnir um ta fyribilsloysn, sum tykist standa fyri.

Ein teirra, sum Sosialurin hevur tosað við, sigur, at verður hetta við arbeiðsskúrunum í Leynum veruleiki, fer at tað bera í sær, at í fyrsta lagi skal ruddast burtur av trøum og øðrum vøkstri í garðinm við skúlan, eins og stórur partur av parkeringsplássinum eisini má víkja. Tað fer so væl at merkja, at teir bilar, sum har hava verið, mugu aðrastani. Og hvar tað er, ber til at ímynda sær.

Hesin grannin heldur tað vera løgið at fremja beinleiðsi vandalismu móti umhvørvinum har, tá tað bara eitt hanagleiv niðari liggja í túsundvís av fermetrum berir, sum saktans kundi verið bygt á. Han vísir tá til økið við ferjuleguna, har nógvir fiskivinnuskúlar kundu verið.

Men sum skilst á øllum pørtum, vit hava tosað við, ivast tey kortini eitt sindur í, um hetta verður til nakað. Tí eitt eru ætlanir, men eitt annað er fígging.

Peningur er settur av til bygging av nýggjum fiskivinnuskúla. Part av hesum peningi ynskir Mentamálaráðið at fáa fluttan til hesa fyribilsloysnina, skilst. Men har hevur fíggjarnevndin hjá løgtinginum sagt kortanei.

So í Vestmanna hugsa tey bara, at hetta eins og annað, sum hevur við Fiskivinnuskúlan at gera, kanska verður eitt sindur ræst, áðrenn liðugt er.

# Fólk ferðast dúgliga

**Ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum var í apríl mánað 21,6 prosent hægri enn í apríl í fjør. Eisini tey, sum koma at taka í móti og siga ferðafólki farvæl, er munandi vaksið, síðan undirsjóvartunnilin lat upp**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Bæði ferðafólkatalið og talið á teimum, sum siga góðan dag og farvæl á flogvøllinum er vaksið munandi í seinastuni. Feðrafólkatalið vaks við 21,6 prosentum í mun til apríl í fjør*

**Flogvøllurin:**
Føroyinar hava góðan hug at ferðast, vísa hagtølini hjá flogvøllinum í Vágum. Vøksturin í apríl var meira enn ein fimting í mun til sama mánað í fjør.

Jákup Persson, varaleiðari hjá Statens Luftfartsvæsen á flogvøllinum í Vágum, sigur, at tað sjálvandi hevur spælt inn, at bæði páskirnar og fiskivinnustevnan vóru í apríl. Men tað er ikki øll frágreiðingin, sigur hann. Tað ferðaðust veruliga nógv meira fólk í aðrar mátar, enn somu tíð í fjør.

Hann vísir á, at rutur sum Ísland og Skotland hava havt vøkstur, og metir hann tað vera orsakað av teimum tilboðum, sum flogfeløgini javnan hava.

Eitt nú feðast væl av fólki til Aberdeen, vísir hann á og nevnir í tí sambandinum, at fyri stuttum fór væl av fólki til eina konsert, sum vera skuldi onkunstaðni í grannalagnum har niðri.

Eisini er tann nógv umrødda konsertin hjá Paul McCartney í Danmark, og hann hevur drigið nógvar føroyingar um flogvøllin, sigur Jákup Persson.

Samlaði vøksturin í ár hevur verið 4,8 prosent, og tað er mest vanlig ferðafólk, sum bera tann vøksturin, sigur hann.

Tiltøk sum fótbóltslandsdystir plaga at merkja eitt útslag í hagtølunum, men enn hevur eingin slíkur verið í ár. Tveir dystir hava verið móti Kasakstan, men har var ikki tað stóra av ákoðarum, sum kom við, so tað síggja tey ikki aftur á flogvøllinum.

At tað ferðast nógv fólk við flogførunum, merkir eisini, at nógv fólk kemur og fer um terminalin, sum ikki skal við flogfarinum kortini. Hetta eru fólk, sum koma at taka í móti fólki og siga farvæl.

Hesi koma vanliga við egnum bili, og tað sæst væl aftur uttanfyri, sigur Jákup Persoon.

– Summar dagar er rættiligur hurlivasi við parkeringini, tá flogførini koma og fara, sigur hann. Hinvegin er ikki so galið við bilum, sum standa í longri tíð. Teir vísa seg at vera færri, enn fryktast kundi fyri.

Men einki røkist fyri, at parkeringsviðurskiftini fara at betrast, vísir Jákup Persson á. Hann sipar til fyrispurningin hjá Marusi Dam í løgtinginum, har hann frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, fekk at vita, at pengar ikki eru settir av til at gera nakað parkeringspláss, sum er.

Men teir ætla at hjálpa upp á tað við at seta parkeringsvørð, sum skal ansa efir, at bilarnir ikki standa ov leingi, varð upplýst í tinginum.